Plantupakki 1:  Harðbalið træ og runnar

| | | | |
|---|---|---|---|
|  | Balsamøsp | *Populus trichocarpa* | Stórt, skjóttvaksandi og breiðvaksið leyvtræ. Kann breiða seg við rótskotum. Harðbalið. Trívist væl í gloprutari grúsjørð. Angar væl, tá bløðini spretta. Fagurlitt leyv um heystið. Úr Alaska. |
|  | Kalifornisk kaprifolia | *Lonicera ledebourii* | Miðalstórur, leyvfellandi runnur. Harðbalin. Nýtiligur bæði sum einsamallur runnur, girðing, klívplanta og lívdál. Tolir eisini skugga. Blómurnar tvílittar, gular við reyðum í. Fruktin svørt ber. Hetta er villslagið. Úr útnyrðings Amerika |
|  | Olearia | *Olearia x hastii* | Miðalhøgur, veturgrønur runnur. Upprent vakstrarlag. Bløðini dimmgrøn. Blómurnar hvítar og gular. Vælegnaður til girðing. Harðbalin. Av Nýsælandi. |
|  | Heba | *Hebe cockayniana* | Lágur, tættvaksin, veturgrønur runnur. Nógvar hvítar blómur tíðliga á sumrinum. Rímiliga harðførur. Úr Nýsælandi. Okkara tilfar: innsavning hjá Nordisk Arboretudvalg (NAU). |